Høgni Hoydal á aðalfundi Føroya Lærarafelags

Vit hava enn ein stirvnan, danskan skúla – á føroyskum

-Tað er alneyðugt, at lærarayrkið fær ta tign og ta virðing, sum tað hevur uppiborið. Til tess krevst eisini, at sáttmála-samráðingar fara at snúgva seg um innihaldið og virðið í undirvísingini, heldur enn um tey stríð, vit higartil hava havt um arbeiðstíð og niðurskurðir segði Høgni Hoydal, landsstýrismaður m.a. í røðu á aðalfundi hjá Føroya Lærarafelag, sum vit prenta í heilum líki



Høgni Hoydal, landsstýrismaður helt røðu á aðalfundinum hjá Føroya Lærarafelag

- Hetta er triðju ferð eg havi fingið tann heiður, at røða á aðalfundi Føroya Lærarafelags. Tað fegnist eg um og takki fyri. Ja, satt at siga, so kann eg ikki ímynda mær nakað forum, har tað kann vera týdningarmeiri at sleppa at siga sína hugsan og at skifta orð við fundarfólkið, tá ræður um framtíðina í hesum landi.

Tit eru røktarar, íblásarar og arbeiðsfólk hjá tí dýrabærasta og broytiligasta, livandi tilfeinginum, vit eiga. Hvør gerð í tykkara yrki skapar nýggjar møguleikar fyri hvønn einstakan og fyri samfelagið. Skapar vitan. Skapar ræsurnar til nýggjan lærdóm. Skapar persónar. Skapar sosialar samanhangir og møguleikar. Skapar fólk og samfelag.

Tí vóni eg eisini, at tit fara at loyva mær at siga mína erligu hugsan um fólkaskúlan. Bæði um ítøkilig viðurskifti og um tær politisku visjónirnar frameftir. Neyvan eru tit samd við mær í øllum, og nógv er sjálvsagt rættiliga merkt av míni politisku sannføring. Men eg haldi tað vera neyðugt at vit tosa erliga og fáa eitt veruligt politiskt kjak um fólkaskúlan. Ikki minst til tess at fylgja tí arbeiðinum upp, sum Annlis Bjarkhamar hegnisliga setti í gongd - bæði við síni rundferð kring landið í SÚS-verkætlanini, menningarætlanini fyri fólkaskúlan og øðrum, sum eg skal venda aftur til.

Vit hava enn ein danskan skúla á føroyskum

1. januar 2002 gjørdist skúlin føroyskur burturav. Okkara ábyrgd fult og heilt. Tað haldi eg átti at verið størsti íblásturin og størsta avbjóðingin undir øllum, sum vit gera frameftir.

Men vit hava higartil ikki megnað at sett sjálvstøðugan føroyskan skúlapolitikk veruliga á breddan. Vit hava politiskt framvegis ilt við at viðgera føroyskan skúlapolitikk sum annað enn seinkaða eftirgerð av donskum skipanum. Og vit hava framvegis ilt við at síggja føroyskan skúlapolitikk sum annað enn onkusvegna eina undirskipan í eini danskari skipan. Øll okkara skúlaskipan er í veruleikanum ein avleggari úr Danmark. Vit hava havt og hava enn eina danska skúlaskipan á føroyskum.

Alt gott um danskan skúlaskap og danskan skúlapolitikk, misskilji meg ikki. Men vit mugu síggja og menna føroyska skúlan sum ein sjálvstøðugan skúla, lagaðan til okkara samfelag og við málinum um, at vit skulu virka og taka lut beinleiðis í altjóða samfelagnum. Tað er eitt ódnartak at fara undir í allari okkara skúlaskipan. Men fólkaskúlin og tit lærarar í fólkaskúlanum eru grundarlagið. Og tað krevur áræði av okkum øllum at fáa ein nútímans, føroyskan skúla.

Tann neiligi fólkaskúlin

Seinastu nógvu árini hevur viðgerðin av fólkaskúlanum og viðurskiftunum kring hann, verið merkt av neiligum anda og nógvum stríði. Bæði orsakað av búskaparkreppuni, ið var. Men eisini av nýggju fólkaskúlalógini, sum varð sett í verk í endanum á eninum valskeiði. Hon fekk eina lítið visjónera politiska viðgerð og elvdi síðani til eitt langt stríð millum politiska myndugleikan og Føroya Lærarafelag.

Tíverri ikki eitt stríð um innihald og framtíðarætlanir. Men eitt stríð um frymlar og prosentir og promillur og niðurskurðir og krónur og oyru og gamlar, óloystar spurningar um savnsrøkt og so framvegis.

Tað harmist eg um. Men eg haldi, at vit kunnu siga her í dag, at øgiliga nógv av stríðsmálunum hava fingið eina loysn. Og at avtalur, sum vit hava gjørt, eru nú settar í verk. Eg kann bert nevna savnsrøktina, flokslærarakunngerðina, bókasavnstímarnar og ymsar niðurskurðir. Eitt stórt mál afturat, nevniliga arbeiðstíðin, hava tit í løtuni uppskot um til hoyringar.

Komið og stríðist um framtíðina

So eg vóni, at vit í dag kunnu siga: Nú er stundin komin, at fólkaskúlin og tykkara arbeiði verður sett í eitt jaligt ljós. Nú má tað verða innihaldið, menningin, atgerðarætlanin og krøvini til okkum sjálv, vit fara at brúka mestu orkuna uppá. At skapa tann góða føroyska fólkaskúlan, sum kann menna okkara børn til føroyskar heimsborgarar. Har næmingar trívast. Og har lærarar trívast og kenna seg virdar fyri sítt arbeiði.

Eg eri tí eisini ómetaliga fegin um tær ætlanir, sum Annlis Bjarkhamar megnaði at loysa úr lagdi, áðrenn hon tíverri varð loyst úr starvi. Og eg havi lagt stóran dent á at fylgja hennara málum og at fáa tey framd. Eg skal nevna 4 mál, sum hon setti í verk:

1. Menningarætlanin fyri fólkaskúlan:

- Eftir rundferðina hjá Annlis Bjarkhamar verður nú arbeitt við at seta menningarætlanina í verk fyri fólkaskúlan. Her verða ávís evni og økir vald at menna komandi árini.

2. Tilboð til næmingar við atferðartrupulleikum:

- Samráðingar og ætlanir eru byrjaðar um eitt ítøkiligt pláss og høli til at skapa eitt tilboð til næmingar við atferðartrupulleikum. Ein loysn, sum møguliga eisini kann sameinast við at plássið kann nýtast til setursskúla summar partar av árinum.

3. At endurskoða sernámsfrøðiliga økið:

- Stig eru tikin til at gera uppskot um, hvussu sernámsfrøðin verður endurskoðað, bygt á álitið, sum varð gjørt, og tað aðalorðaskiftið, sum Løgtingið hevði um málið. Dentur skal leggjast á samskipan millum skipanirnar í almannaverkinum og í undirvísingarverkinum.

4. At endurskoða lærara- og pedagogútbúgvingina:

- Nevndin er farin til verka. Endamálið er at samskipa lærara- og pedagogútbúgvingina, gera føroyska útbúgving frá grundini og at samskipa læraraa- og pedagogútbúgving við hægri lestur og gransking.

Fólkaskúlalógin eftirmetast

Hetta eru alt stig til at skapa ein føroyskan skúla á egnari grund, sum eisini skal virka í altjóða samfelagnum. Eg havi eisini umhugsað, at hóast nýggja fólkaskúlalógin er so mikið ung, so er tørvur á at eftirmeta hana og gera broytingar í henni. Men tað skal byggjast á royndirnar av tí, sum nú verður sett í verk, so vit ikki hava alt ov nógv tógv á snælduni, meðan vit binda pløgg og royna at fáa tey at sita.

Arbeiðstíðaruppskotið – ábyrgd og liðiligheit

Og tað fær meg at nema aftur við tað stóra málið, sum tit í løtuni verða hoyrd um: Uppskotið um at skipa arbeiðstíðina hjá lærarum.

Eg eri sera fegin um tað arbeiðið og ta semjuna, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt. Onkur knútur var, sum vit hava loyst, áðrenn vit sendu uppskotið út.

Eg haldi, at uppskotið eigur at vísa aftur tí ótta og iva, sum eg veit, at fleiri lærarar hava havt um arbeiðstíðaruppskotið. Hetta er ikki eitt amboð, sum skal elva til minutt-eftirlit við stoppuri. Tvørturímóti byggir uppskotið í fyrsta lagi á tær semjur og skipanir, sum eru gjørdar seinastu árini. Og í øðrum lagi kann hetta gerast amboð til betri pedagogiskar møguleikar, liðiligheit og ábyrgd hjá einstaka læraranum og einstøku skúlunum.

Uttan eina arbeiðstíðarskipan, sum er liðilig, gerast pløggini alt ov trong til at vit fáa arbeitt fyri at menna fólkaskúlan og givið rúmd fyri egnum loysnum og nýggjum møguleikum.

Burtur frá sentralstýringini til størri ábyrgd

Málið fyri at menna ein føroyskan fólkaskúla liggur í at hava minni sentralstýring og at sleppa undan einum stívum bygnaði, har øll orkan fer til at tosa um smálutir og prosent og niðurskurð.

Vit vilja eina liðiliga skipan, har nógv størri ábyrgd er hjá einstaka skúlanum, leiðsluni og lærarunum. Vit skuu seta nakrar karmar og nøkur minstukrøv frá politisku umsitingini, men síðani skal tað vera upp til lærara, leiðslu og næmingar at røkka krøvunum við sínum egnu loysnum.

Vit skulu burtur frá hugtøkum sum pultstímar á 45 minuttir og heldur tosa um lærdóm og undirvísing í nógv breiðari høpi. Sum alt tað arbeiðið og tann lærdóm, ið verður skaptur á skúlunum og tí umhvørvi, ið skúlin virkar í.

Skúlarnir skulu hava umstøður at ganga nýggjar og egnar leiðir í at røkka

Framhald á næstu síðu

VIÐMERKINGAR

Tjóðveldisútvarp?

Johan Petersen

Tjóðveldisflokkurin ger sær dælt av vantandi lógargrundarlagi fyri Útvarpi Føroya. Ei undur í, at hesin flokkurin nú í fimm ár hevur forðað fyri, at skil fæst á við at fáa sett í gildi eina fjølmiðlaábyrgdarlóg, so leingi flokkurin kann misnýta útvarpið, og so leingi útvarpið letur seg misnýta.

Ein av fortreytunum fyri, at nýggja kringvarpslógin kundi virka sum ætlað, var, at ein fjølmiðlaábyrgdarlóg bleiv sett í gildi. Tjóðveldisflokkurin hevur nú í fimm ár havt hetta málsøki í landsstýrinum og hevur øll hesi fimm árini forðað fyri, at slík lóg er samtykt.

Hví ger Tjóðveldisflokkurin hetta, kann verða spurt. Hevur flokkurin fyrimun av vantandi lógargrundarlagi fyri útvarpinum? Eingin ivi er um, at júst hetta er orsøkin til, at flokkurin higartil hevur forðað fyri hesum:

- hyggja vit at bygnaðinum í útvarpinum, so er tað landsstýrismaðurin í mentamálum, sum er tjóðveldismaður (Høgni Hoydal), sum er hægsti myndugleikin, og sum setur og loysir stjóran í og úr starvi
- varastjórin (í hvussu so er til hetta starvið fyribils varð niðurlagt) er tingmaður og býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin (Jógvan Arge)
- programmleiðarin er tingmaður og býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin (Jógvan Arge).

Negativ dansk tíðindi, sjálvstýristíðindi og fullveldismálið

Í mínari tíð í gomlu útvarpsnevndini, sum nú er farin í søguna, var aðalmálið, at útvarpið hvørki mátti kunna misteinkjast fyri ella enn minni at vera flokspolitiskt. Tann stóri spurningurin er so, um broytti bygnaðurin sæst aftur í virksemi útvarpsins, og eingin ivi er um, at hetta í alt størri mun ger seg galdandi í virkseminum:

- Tað er rárasta hending, at positiv dansk tíðindi verða borin fram. Dansk tíðindi hava sum oftast ein negativan undirtóna. Nøkur dømi:
- týdningarmikli danski ES-formansskapurin, sum fær altjóða rós, verður als ikki viðgjørdur. Bert ein hissini tíðindastubbi 13. desember 2002 um ES-víðkanina við 10 londum
- nýggjárstala Anders Fogh Rasmussens verður ikki viðgjørd annað enn sum ein viðmerking til nýggjárstalu Hans Enoksens 6. januar 2003
- neyðtøka av føroyskari kvinnu verður viðgjørd nærmast sum ein framhaldssøga 7. januar, 8. januar og 15. januar 2003
- reinari havumhvørvi eftir føroyska yvirtøku 17. januar 2003
- danir ikki so mikið sum kunna føroyingar um Kunngerðablaðið B 7. apríl 2003

- Grønlendsk sjálvstýristíðindi hava sera høgan prioritet. Nøkur dømi:
- eitt langt tíðarbil virkar Kupik Kleist nærmast sum tíðindamaður útvarpsins
- langt innlegg frá nýggjárstalu Hans Enoksens 2. januar 2003
- aftur innlegg frá nýggjárstalu Hans Enoksens 4. januar 2003
- aftur innlegg frá nýggjárstalu Hans Enoksens 6. januar 2003

- Føroyska fullveldismálið hevur hægsta prioritet. Nøkur dømi:
- blaðgrein hjá Kristinu Háfoss verður viðgjørd 11. mars 2003
- innlegg frá Hermanni Oskarssyni á landsfundi Tjóðveldisfloksins unm lagaligu løtuna at skera blokkin burtur verður viðgjørt sum tema í sendingini Føroyar í dag 22. apríl 2003.
- Innleggið hjá Hermanni Oskarssyni á landsfundi Tjóðveldisfloksins verður aftur viðgjørt sum tema í sendingini Sostatt 23. apríl. Útvarpsverturin sigur beinleiðis, at kjakið er horvið, og útvarpið vil tí kveikja lív aftur í málið. Bert Tjóðveldisflokkurin er umboðaður í báðum sendingunum, og Høgni Hoydal hevur orðið mestsum alla tíðina. Lurtari við øðrum sjónarmiði verður avbrotin.
- innlegg við samrøðu við Høgna Hoydal um grein hjá Sjúrða Skaale 27. apríl kl. 14.
- innlegg við samrøðu við Hergeiri Nielsen um støðu Tjóðveldisfloksins um kríggið í Irak 27. apríl kl. 18.30.
- til samanbering kann nevnast, at ES-ráðgevi av føroyskari ætt, sum á landsfundi Sambandsfloksins vísti á føroyskan isolationspolitikk, bleiv ikki tikin upp á tungu.

Ikki óheftan og nøktandi tíðindaflutning

Sum heild kann sigast, at tann, sum ikki hevur aðrar tíðindakeldur enn útvarpið at dúva uppá, fær ikki óheftan og nøktandi tíðindaflutning.

At sjálvur løgtingsins umboðsmaður hevur átalað manglandi lógargrundarlag útvarpsins, sigur ikki so lítið. Hetta vísir við allari týðiligheit, at Tjóðveldisflokkurin ikki virðir demokratisku spælireglurnar. Tjóðveldisflokkurin misnýtir beinleiðis sína ávirkan á útvarpið, og enn verri: útvarpið letur seg misnýta.

Fakfeløgini átala Karsten Hansen

TÍÐINDASKRIV

Í fjølmiðlunum síggja vit, at Karsten Hansen, landsstýrismaður hevur upplýst, at hann ikki vil góðkenna sáttmálan, um Maskinmeistarafelagið og SEV hava gjørt.

Lønarhækkingin hjá maskinmeistarunum svarar til uml. kr. 16,50 um tíman, um prosentini, sum maskinmeistararnir hava fingið, verða umroknaði til lønartalvuna hjá teimum ófaklærdu.

Vit hava fingið upplýst, at maskinmeistararnir hjá SEV 2 ferðir hava fingið løn útgoldna eftir nýggja sáttmálanum, og at Fíggjarmálaráðið ongantíð tey seinastu uml. 15 – 20 árini hevur kravt at fingið sáttmálarnar hjá SEV og Maskinmeistarafelagnum til góðkenningar.

Hvør er grundin til úttalilsini hjá Karsten Hansen?

Sum skilst hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag roynt at fáa fíggjarmálaráðharra okkara at leggja seg út í sáttmálaviðurskiftini hjá Maskinmeistarafelagnum og SEV, og endamálið er at leggja undirritaðu felogum forðingar í vegin fyri at fáa somu lønarhækking, sum aðrir starvsbólkar í samfelag okkara hava fingið.

Landsstýrismaðurin leyp á leistum fyri privatu arbeiðsgevarunum, hóast stórur ivi helst er um heimild hansara, nú Landsstýrið fyri fyrstu ferð í 15 – 20 ár tykist at vísa sáttmálaviðurskiftunum hjá Maskinmeistarafelagnum og SEV nakran áhuga, tí neyvan kann Karsten Hansen bróta siðvenjuna um, at Fíggjarmálaráðið ikki leggur seg út í hesi sáttmálaviðurskifti.

Karsten Hansen stuðlar framhaldandi øking í lønarmuninum millum tey lægtsløntu og tey við hægri inntøkum

Við úttalilsum sínum er Karsten Hansen miðvíst farin í part við privatu arbeiðsgevarunum, sum ikki tykjast vilja unnna vanliga ófaklærda arbeiðaranum somu hækking upp á tímalønina, sum tey hægri løntu fáa.

Vit spyrja okkum sjálvi hví arbeiðsgevararnir og landsstýrismaðurin ikki kunnu unna tí lægstlønta sama krónutal upp á tímalønina, sum aðrir starvsbólkar hava fingið.

Fakfeløgini átala ódámligu uppleggingina hjá Kartsen Hansen

Undirritaðu fakfeløg átala harðliga úttalilsini hjá Karsten Hansen, tí tað er eyðsæð, at orsøkin til hesa uppilegging er at royna at forða limum okkara at fáa somu lønarhækking, sum aðrir starvsbólkar hava fingið.

Hesin ágangur hevur tó styrkt samanhald okkara enn meira, og vit skulu gera fíggjarmálaráðharranum greitt, at vit standa rimmarfast við krøv okkara, tí vit fara ikki at góðtaka, at lønarmunurin millum limir okkara og tey hægri løntu framhaldandi fer at økjast.

Tórshavn, 05.05.2003

Føroya Arbeiðarafelag

Havnar Arbeiðsmannafelag

Havnar Arbeiðskvinnufelag

Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag

Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag